gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Landsstýrið tvíbýtt um sáttmálan

Tey lágløntu i Starvsmannafelagnum fáa eina munagóða lønarhækking, og tað er alla æru vert, tí tey liggja í nógvum førum væl niðan fyri lønirnar á privata arbeiðsmarknaðinum. Harafturat verður lønarskipanin einfaldari. Eisini eggjar nýggi sáttmálin limum í Starvsmannafelagnum til støðugt at menna seg og fáa ein ágóða burtur úr tí. Tað er neyðugt, um vit skulu hava ein effektivan almennan sektor og eitt dynamiskt samfelag.

Starvsmannafelagið og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fegnast um nýggja sáttmálan, men tað ger løgmaður ikki. Og tað er kanska skilligt. Fyri tað fyrsta tí, at tann nýggi sáttmálin kostar tí almenna nógv, og fyri tað annað fer hann óivað at hava avleiðingar fyri aðrar sáttmálasamráðingar, eisini á privata arbeiðsmarknaðinum.

Øll ásanna, at flestu prísir eru farnir nógv upp tey seinastu árini, og tí er torført hjá vanligum løntakarum at fáa tað at røkka til í húsarhaldinum. Tá øll ásanna hetta, er neyðugt, at tann tøka reallønin verður størri, serliga hjá lág- og meðalinntøkunum.

So er spurningurin, um lønarhækking er einasti møguleikin? Fakfeløg samráðast um lønina og ikki um skatt og avgjøld, men spurningurin er, um ein skattalætti ikki hevði avmarkað tey høgu lønarkrøvini? Tí, sum Anfinn Kalsberg, sigur, ein stór lønarhækking er ein skrúva uttan enda: Hon elvir til verri kappingarføri, og skapar hægri kostnaðarstig og inflatión.

Men hví syrgdi løgmaður ikki fyri, at føroyskir løntakarar fingu ein skattalætta, sum merktist? Tá Fíggjarmálastýrið ikki kom við uppskoti um lægri skatt – m.a. eftir kravboði frá Fólkaflokkinum – kundi Fólkaflokkurin tikið undir við skattauppskotinum hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum!!! Men Tjóðveldisflokkurin rópti hann upp á pláss.

Men hvat ger Tjóðveldisflokkurin – sum við hvørt høvi tosar um búskaparliga ábyrgd, og hvørki kann lækka bensin, olju, skatt ella varðveita rentufrádrátt – , nú? Jú, hann slóðar fyri eini lønarhækking, sum er stór, og sum hevur ókendar búskaparligar avleiðingar við sær?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kanska sleppur merkið ikki í Løgtingið

**Helena Dam á Neystabø**
*Vegna Sjálvstýrisflokkin*



Sjálvstýrisflokkurin hevur skotið upp fyri Løgtinginum, at merkið, føroyska flaggið, fær eitt sjálvsagt heiðurspláss inni í Løgtinginum. Tað man helst undra mangan, at merkið als ikki er at síggja nakra staðni í Løgtinginum. Tað er hóast alt í Løgtinginum at evsti og hægsti myndugleiki í Føroyum starvast. Her verða karmarnir gjørdir, sum skulu tryggja landi og fólki eitt gott samfelag. Í merkinum sameina vit alt sum føroyskt er, hetta symbol ber í sær stóran og margfaldan týdning um fólk, mentan, náttúru, søgu, trivnað, vinnulív, fiskiskap, ja eisini okkara kenslur, vónir og framtíðarhugsjónir síggja vit í merkinum. Virðir, ið eiga at liggja til grund fyri øllum tí arbeiði, ið Løgtingið ger.

Tað finst eingin betri áminning á løgtingsmenn altíð at tæna fólki og landi í arbeiði sínum.

Men nú kemur so tað allar mest undrunarverda. Fyrsta tekin frá formansskapinum í Løgtinginum um, at brævið frá Sjálvstýrisflokkinum er komið vegin fram, stóð at lesa í Dimmalætting leygardagin. Har verður løgtingsformaðurin endurgivin fyri at siga, at helst kemur merkið ikki á ting, tí tað er óføroyskt.

Hetta er fullkomiliga óskiljandi tala. Er tað veruliga so galið, at tað finnast tingfólk, ja enntá tjóðveldisfólk, ið ikki orka at síggja merkið í dagliga arbeiði sínum í Løgtinginum.

Skiljið tað, hvør ið skilja tað kann. Vit í Sjálvstýrisflokkinum skilja tað ikki, og vóna framvegis at formansskapurin gongur hesum skilagóða ynski og uppskoti á møti. Og vit vænta at fáa eitt svar.

Tað kann væl ikki vera so illa vorðið, at bert tí at uppskotið ikki kom frá Tjóðveldisflokkinum, men frá Sjálvstýrisflokkinum, so er tað kolldømt av tingformanninum, sum er tjóðveldismaður.

# Ísraelskur sendiharri á vitjan

**Síðst í apríl mánaði kemur ísraelski sendiharrin í Danmark, Yitzhak Eldan, á vitjan í Føroyum**

VITJAN
*Eyðun Klakstein*

Í døgunum frá 27. til 30. apríl verður ísraelski sendiharrin í Danmark á vitjan í Føroyum.

Tað er felagsskapurin, Vinir Ísraels, sum eru vertir fyri ferðini hjá Yitzhak Eldan til Føroya, men á skránni hjá ísraelsmanninum eru fundir við almennar persónar í Føroyum.

Eldan skal hitta Anfinn Kallsberg, løgmann, Bjarna Djurholm, landsstýrismann, og Vibeke Larsen, Ríkisumboðsmann.

Harafturat vitjar Eldan eisini borgarstjóran í Havn, á Tvøroyri og í Skopun.

### Útsendur

Yitzhak Eldan hevur verið útsendur av ísraelsku stjórnini í fleiri londum, men síðani 1999 hevur hann verið sendiharri í Keypmannahavn.

Síðani 1995 hevur hann verið leiðari fyri deildini, sum tekur sær av upplæringini av sendiharrum hjá Ísrael, og hann hevur eisini skrivað bøkur um hetta.

Eldan var føddur í Marokko í 1942, men flutti sum 13 ára gamal til Ísrael. Hann hevur lisið søgu og politikk, og hann hevur eisini útbúgving í samskifti við universitetið í París.

Umframt fundir við politikarar og onnur skal Eldan eisini gera útferðir í Føroyum, so hann fær møguleika at síggjan nakað av landinum, meðan hann vitjar her.



*Ísraelski sendiharrin í Danmark kemur síðst í mánaðinum á vitjan í Føroyum og skal millum annað hitta løgmann*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Landsstýrismaðurin ásannar trupla støðu

**Støðan hjá samferðsluni millum oyggjarnar er viðbrekin, tí skipini eru so gomul og slitin, ásannar landsstýrismaðurin. Landsstýrið hevur viðgjørt keyp av brúktum avloysaraskipi til Strandferðsluna**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Landsstýrið hevur viðgjørt spurningin um at keypa eina brúkta ferju, sum Strandferðslan kann hava sum fast avloysaraskip, men semja er ikki um hetta keyp.

Tað sigur landsstýrismaðurin við ábyrgd fyri samferðsluni, Bjarni Djurholm.

Strandfaraskip Landsins hava skotið upp fyri landsstýrinum, at Strandferðslan fer at leita eftir einari 5 til 10 ára gamlari ferju, sum kann keypast fyri einar 20 til 25 milliónir krónur.

Hendan ferjan, sum kann verða á støðd millum Ternuna og Dúgvuna, skal so verða fast avloysaraskip hjá Strandferðsluni.

– Vit hava havt málið á borðinum, men tað er ikki politisk semja um tað, sigur Bjarni Djurholm.



*– Strandferðslan hevur ongan møguleika at halda eina tænastu, um eitt skip fær maskinbrek, og tá miðalaldurin á skipunum eru yvir 30 ár, so eru møguleikar fyri tekniskum brekum til staðar, sigur Bjarni Djurholm, sum tó heldur, at glottar eru fyri framman*

### Línudansur

Seinastu vikurnar hevur samferðslan um Lorvíksfjørð og Vestmannasund verið merkt av, at Dúgvan hevur havt maskinskaða.

Leiðirnar millum meginøkið, Norðoyggjar og Vágar hevur verið rakt av verri tænastu, minni skipum og longri bíðitíð hjá ferðandi.

Strandferðslustjórin, Reidar Nónfjall, staðfestir, at støðan hjá Strandferðsluni er vánalig, tá eitt skip verður rakt av maskinskaða.

Strandferðslustjórin segði í farnu viku við Sosialin, at virksemið hjá SL er ein dagligur línudansur, tí skipini eru so gomul, at møguleikin fyri tekniskum brekum er stórur. Hann kann so ikki veita trygd fyri, at líknandi støða sum tann við Dúgvuni ikki kemur fyri aftur.

### Glottar at hóma

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, gevur Strandferðslustjóranum rætt í, at stovnurin er í einari truplari støðu.

– Strandferðslan hevur ongan møguleika at halda eina tænastu, um eitt skip fær maskinbrek, og tá miðalaldurin á skipunum eru yvir 30 ár, eru møguleikar fyri tekniskum brekum til staðar, sigur Bjarni Djurholm, sum tó heldur, at glottar eru fyri framman.

– Vit fáa nú nýtt skip til Sandoyarleiðina, og um tvey ár verður vónandi koyrandi um Vestmannasund. Harafturat skal nýtt Suðuroyarskip byggjast, og tað fer at nøkta tørvin á hesi farleið nógv ár fram í tíðina, sigur hann.

Bjarni Djurholm ásannar tó, at støðan her og nú er vánalig.

– Tvær ferðir í míni tíð sum landsstýrismaður hava vit verið noydd at fara í fíggjarnevndina eftir pengum, tí Dúgvan hevur fingið brek. Tað kostar bæði orku og pengar at leiga ferjur at avloysa strandfaraskipini, og tí hevði sjálvsagt verið lættari við eini fastari avloysaraferju.

### Komandi tvey árini

Bjarni Djurholm heldur, at tað verða serliga komandi tvey árini, sum kunnu fara at volda trupulleikar í samferðsluni millum oyggjarnar.

– Tá undirsjóvartunnilin um Vestmannasund er liðugur, hava vit Ternuna at taka til. Hetta verður um eini tvey ár, og tí hevur landsstýrið viðgjørt spurningin um, hvat skal gerast komandi tvey árini. Vit hava tó onga politiska semju gjørt um hetta mál, sigur Bjarni Djurholm.

Strandferðslan hevur júst leigað avloysaraferju fyri Dúgvuna, og hetta leigumálið kostar næstan 40.000 krónur um dagin.

Spurningurin er tí, um tað í longdini kann loysa seg betur at eiga enn at leiga avloysaraskip – ikki bara fyri tænastuna hjá Strandferðsluna, men eisini reint fíggjarliga.

# Politisk skarnsgerð

**Formaður Fólkafloksins, Óli Breckmann, skilir væl, at løgmaður ikki er nøgdur við sáttmálan, sum Karsten Hansen hevur gjørt við Starvsmannafelagið. Men hann væntar ikki av fíggjarmálaráðharran um, at hann skilir løgmann. Óli er ivaleysur í, at skattalætti hevði verið munandi betri og hann metir nýggju lønaravtaluna góða fyri landskassan, men vánaliga fyri føroyingar og eisini fyri fullveldisætlanirnar**

SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*



*Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins, heldur um nýggju lønaravtaluna millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, at hon er góð fyri landskassan, men vánalig fyri føroyingin. Hann mælir ístaðin til skattalætta*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, sigur seg í blaðnum í gjár ikki skilja, at løgmaður metir nýggja sáttmálan við Starvsmannafelagið, sum eina skrúvu uttan enda. Karsten Hansen segði, at hann boðaði løgmanni frá semjuni, áðrenn undirskrivað varð.

Men formaður Fólkafloksins, Óli Breckmann, skilir væl løgmann. Eisini metir hann tað sum eina politiska skarnsgerð, tá Fíggjarmálastýrið í síðstu løtu boðar løgmanni frá.

Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið skrivaðu undir áðrenn miðnátt tann 8. apríl

– Eg skilji væl, um løgmaður kennir seg snýttan, tá hann fær boð um semjuna umleið klokkan 22:20, tá klárt er at skriva undir. Tað er ein politisk skarnsgerð, men eg veit ikki, um eg vænti, at fíggjarmálaráðharrin skilir, sigur Óli Breckmann.

### Heldur skattalætta

– Búskapurin hevði fingið munandi betri ávirkan við skattalætta, ið gagnaði lægru lønunum, men eisini teimum lønum, ið eru óstøðugar. Ein skattalætti, ið gav størri eggjan. Tá høvdu vit sloppið undan nagativari ávirkan, sigur Óli Breckmann.

Karsten Hansen hevur sagt, at skattalættar eru framdir og hesum er Óli partvís samdur í.

– Tá tað var frammi um skattalætta, var Karsten Hansen tann tvøri og kargi parturin. Hann mátti tvingast til teir skattalættar, ið eru framdir, sigur Óli Breckmann.

Óli Breckmann førir fram, at ein skattalætti munar dupult, ið mun til eina bruttolønarhækking.

– Av 100 krónum, fara 60 krónur aftur í landskassan og hinar 40 krónurnar fara í hægri prísum og tænastugjøldum. Ein króna í skattalætta, munar ímóti 2,20 krónum í bruttolønarhækking, sigur formaður Fólkafloksins.

Hann metir, at ein skattalætti ger mun hjá tí einstaka, umframt at bøta um kappingarførið í vinnuni. Eisini er skattalættin betri fyri búskapin og einasti, ið vinnur við lønarhækkan, er landskassin, so leingi vit hava uppgangstíðir.

### Útgjaring

Óli Breckmann leggur dent á, at sjálvsagt unnir hann føroyingum løn og betraðar umstøður í so máta.

– Eg meti ikki, at tað er ørt av Karsten Hansen at geva meira í løn, men hinvegin at strongja búskapin, so at bert landskassin fær nakað burturúr.

– Lønaravtalan er góð fyri landskassan, men vánalig fyri føroyingin , sigur Óli Breckmann, og vísir á, at landskassin her letur út 60 milliónir og fær inn yvir 100 milliónir.

Ói Breckmann er ivaleysur í, at nýggi sáttmálin hevur við sær hitaðan búskap og verri kappingarføri og príshækkan.

Spurdur, um hann metir hetta sum útgjaring, nú tað so smátt stundar til val, leggur Óli ikki fingrarnar ímillum.

– Tjóðveldisflokkurin sendi herfyri bræv til Fólkaflokkin viðvíkjandi útgjaring. Tá hevur Høgni Hoydal helst fyrireikað ávirkanina av hesum og hevur blakað við torvmold, sigur Óli Breckmann.

Brævið frá Tjóðveldisflokkinum snúði seg um andstøðuuppskot viðvíkjandi lækkaðum bensinprísum, avgjøldum, sum samgonguflokkurin Fólkaflokkurin tók undir við. Talan var um 6 milliónir.

– 60 milliónir hita búskapin 10 ferðir so nógv, sum 6 milliónir, sigur Óli Breckmann millum annað viðvíkjandi hesum og hann avvísir ikki útgjaring.

– Og fyri fullveldisætlanirnar er bruttolønarhækkingin so avgjørt eitt afturstig. Samfelagið verður dýrari at reka, men borgarin er framvegis í somu støðu, sigur Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins.

**Óli Breckmann:**

– Tá hevur Høgni Hoydal helst fyrireikað ávirkanina av hesum og hevur blakað við torvmold

– Fyri fullveldisætlanirnar er bruttolønarhækkingin so avgjørt eitt afturstig

– Eg skilji væl, um løgmaður kennir seg snýttan, tá hann fær boð um semjuna umleið klokkan 22:20, tá klárt er at skriva undir. Tað er ein politisk skarnsgerð, men eg veit ikki, um eg vænti, at fíggjarmálaráðharrin skilir

– Tá tað var frammi um skattalætta, var Karsten Hansen tann tvøri og kargi parturin. Hann mátti tvingast til teir skattalættar, ið eru framdir